TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Endurlýsing

Serstovan

Serstovan inni á Gøtu er eitt nýtt dagstovnatilboð í Havn til børn, sum vegna teirra brek ikki fáa gagnnýtt vanliga dagstovnatilboðið. Hon er í fyrsta umfari ætlað børnum undir skúlaaldri, sum eru fjølbrekaði og hava tørv á serligari stimbran og umsorgan í einum mennandi umhvørvi.

Serstovan hevur hølir í einum sethúsum inni á Gøtu, og pláss verður fyri 6-7 børnum.

Samstarv verður við Býlingshúsið inni á Gøtu.

- onnur leys størv? Hygg á www.torshavn.fo

Leiðari til nýggjan serdagstovn í Tórshavnar kommunu

Vegna ov fáar umsøkjarar, verður søkt av nýggjum eftir leiðara til serstovuna inni á Gøtu at byrja uml. 15.oktober 2005 ella eftir avtalu.
Stovnurin er ætlaður fjølbrekaðum børnum í Havnar kommunu.

Starvið
Søkt verður eftir einum dagstovnaleiðara við pedagogiskari útbúgving at starvast fulla tíð.
Søkt er áður eftir pedagogum, ergo- og fysioterapeuti og sjúkraræktafrøðingi til eitt tvørfakligt starvsfólkatoymi, og eru fleiri umsóknir komnar til hesi størv.

Vit bjóða
eitt áhugavert starv, har tú sum pedagogiskur leiðari av einum tvørfakligum toymi ert við til at byggja upp eitt mennandi dagstovnatilboð til børn við serligum tørvi.
Kommunan hevur keypt eini sethús til endamálið, og fært tú høvi at seta tín dám á stovnin, seta starvsfólk og annars vera við í øllum tí, sum skal til, fyri at stovnurin skal virka eftir ætlan.
Tætt samstarv verður við kommunalu Stuðulsfólkaskipanina og fyrisitingarligt samstarv verður við leiðaran av býlingshúsinum inni á Gøtu.
Skipað verður fyri ráðgeving, supervisión og skeiðvirksemi.

Førleikakrøv
Vit ynskja at umsøkjarin:
- er útbúgvin pedagogur
- hevur hug og hegni at leiða og menna eitt tvørfakligt starvsfólkatoymi
- hevur royndir við fjølbrekaðum børnum og innan tað sernámsfrøðiliga arbeiðsøkið
- hevur hug og áræði at skapa eitt trygt og stimbrandi umhvørvi, merkt av virðing fyri børnum, foreldrum og starvsfeløgum
- hevur góð samstarvsevni, er førur fyri at skilja støðuna hjá øðrum og dugir at loysa trupulleikar
- sær møguleikar framum forðingar
- hevur ein ávísan kunnleika til KT- tøkni
- er opin fyri møguligum bygnaðarbroytingum innan økið

Setanarviðurskifti
Leiðarin verður settur sum dagstovnaleiðari í Tórshavnar kommunu. Starvið er fulla tíð og er lønt sambært sáttmálunum millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelaga Føroya.

Meiri fæst at vita
um starvið við at venda sær til Birgit Debess, leiðara í Stuðulsfólkaskipanini, Katrin Petersen, samskipara, tlf. 30 20 10 ella Poulu Eidesgaard, dagstovnaleiðara, tlf. 31 77 01.

Umsókn
saman við upplýsingum um útbúgving og royndir og møguligum viðmælum skulu vera Stuðulsfólkaskipanini í Tórshavnar kommunu, Postrúm 32, FO-110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi hósdagin 22. september 2005. Viðmerk á umsóknina "Serstova".

Tvingsilssøla

Tvingsilssølan yvir skipið **»Høgifossur« OW 2348, BRT 2273, NRT 884,** ið var ásett at verða hildin á Dómaraskrivstovuni fríggjadagin tann 2. september 2005, kl. 13.00, **er útsett** og verður ístaðin hildin á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøtu 1, 100 Tórshavn, **fríggjadagin tann 21. oktober 2005, kl. 13.00.**

Skipið er bygt í 1984 á Langsten Slip & Båtbyggeri A/S í Noregi. Skipið er skrásett í Sandavági í 1984.

Sambært skipaskrásetingini eigur P/F Samvinnufelagið, 360 Sandavági, skipið.

Tvingsilssølan er umbiðin av **Nielsi Wintther Poulsen, advokati, Fr. Petersensgøtu 9, Tórshavn, tlf. 311145 (j.nr. 20050533),** sum kann geva nærri upplýsingar, og sum nærri avtala kann gerast við, um ynskt verður at síggja skipið.

Áhugað kunnu eisini síggja søluuppstilling og onnur skjøl í sambandi við tvingsilssølurna við at venda sær til Føroya Fútarætt.

Føroya Fútarættur
hin 29. august 2005

Hús á Sandi

Stór og rúmlig hús við mongum møguleikum og einum avbera góðum útsýni.
Bygd í 1975. Eru sera lýggj og í góðum standi, men krevja smávegis ábøtur.

Grundøkið er til víddar 905 m². Húsini til víddar 17 m x 6,5 m eru í tveimum hæddum umframt ovasta loft.

Ovara hæddin:
Rúmligur køkur við spísikróki og vinkulstovu. Hjúnarúm, 2 kømur, baðirúm við wc, umframt 2 onnur wc rúm.

Niðara hæddin:
Inngongd, durur, gangur og trappa upp. Stórt ljós kjallararúm, 2 kømur, 1 wc, vaskirúm og hjallsrúm.

Nærri fæst at vita um húsini, yvirtøkudag v.m., við at ringja til okkara. Fleiri myndir eru eisini á heimasíðu okkara www.hentze.fo

Demmus Hentze lrs. **Turið Debes Hentze,** adv. og mediator m.m.c.r.

www.hentze.fo
Bringsnagøta 23 · Postboks 236 · FO 110 Tórshavn
Tlf. 311460 · fax 318164
e-mail: hentze@post.olivant.fo

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/F 3108, P/F LM Electric, 100 Tórshavn.
Nevnd:
Farin úr nevndini: Leivur Holm, Villingardalsvegur 28, 100 Tórshavn (nevndarformaður)
Innkomin í nevndina: Sverri Martin Nysted Hansen, Brúarás 11, 111 Reykjavík (nevndarformaður)

Skráseting Føroya
tann 12. september 2005

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/F 2466, P/F Klaksvíkar Sleipistøð, 700 Klaksvík.
Partapeningur: Viðtikið tann 26/7-2005 at lækka partapeningin við kr. 170.000,00 til kurs 100, til annulatión av egnum partabrøvum, eftir at proklama er runnið.

Skráseting Føroya
tann 12. september 2005

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/F 790, P/F Team 85, 110 Tórshavn.
Nevnd:
Farin frá sum nevndarformaður: Hjalgrim Lindenskov Samuelsen, Lítlatrød 3, 100 Tórshavn
Farin frá sum næstformaður: Andreas Benny Lindenskov Samuelsen, M. Heinasonargøta 8, 100 Tórshavn
Innkomin sum nevndarformaður: Andreas Benny Lindenskov Samuelsen, M. Heinasonargøta 8, 100 Tórshavn
Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Johnny Gaard, Niðaragøta 74, 188 Hoyvík
Innkomin sum stjóri: Hjalgrim Lindenskov Samuelsen, Lítlatrød 3, 100 Tórshavn

Skráseting Føroya
tann 12. september 2005

Kristin Balle

GÓÐIR BRÚKTIR BILAR

Opel Astra 1.7 Dt
árg 1997, bláur, 5 hurðar, km 140.000, *bilurin verður seldur við motorbreki*
19.000,-

Citroen Jumpy Hdi 7 pers
árg 2002, gráur, 4 hurðar, km 63.000, *fyrr kr. 189.000,-*
nú 159.000,-

Opel Vectra 2.0
árg 2000, gráur, 5 hurðar, km 36.000
129.000,-

Citroen Xsara 2.0 Hdi
árg 1999, gráur, 5 hurðar, *fyrr 89.900,-*
nú 72.000,-

Opel Vectra 2.0 CDX
árg 2000, gráur, 4 hurðar, km 79.000, *fyrr 159.000,-*
nú v/mvg 145.000,-

Toyota Corolla 2.0 Diesel
árg 1998, grønur, 4 hurðar, km 131.000
92.000,-

Opel Movano 2.2 Dti vøruvognur árg 2004, reyður, 4 hurðar, km 8.000, *fyrr 200.000,-*
v/mvg 185.000,-

Toyota Carina E 1.8 GLX
árg 1997, bláur, 4 hurðar, km 134.000, *fyrr 79.000,-*
nú 69.000,-

VW Transporter Diesel
árg 1999, bláur, 4 hurðar, km 115.000, *fyrr 110.000,-*
nú 98.000,-

Toyota Hi Lux 4x4 Db. Cab
árg 1994, reyður, 4 hurðar, km 137.000, *fyrr 84.000,-*
nú 64.000,-

Citroen Jumpy 1.9DT Van
árg 2000, reyður, 4 hurðar, km 45.000
nú 95.000,-

P/F Meinhardt Arge

Givið gætur: Bilarnir á listanum kunnu verða seldir
Fyrispurningar kunnu verða settir á telefon 34 54 00, eisini ber til at senda teldupost til: nissan@bilarge.fo, peugeot@bilarge.fo ella opel@bilarge.fo - Bilarnir finnast eisini á: www.bilarge.fo

P/F Meinhardt Arge
v/ Oyggjarvegin • Postsmoga 3171 • 110 Tórshavn • Tel. 31 61 61

Sosialurin 341800